

(…)

## Hví køvist allur hugurin…

Retorikkurin hjá Una er kanska sterkastur í hesi sjangru. Her er sjalvt endamálið at skera inn á bein. Og tað lukkast.

Men alla tíðina kenni eg á mær, at vit eru í skúla og hava føroyskt. Her eru ov nógvar bindingar til lesibøkur og skúla. Ja, kenni í støðum turra kritið úr skúlanum millum fingararnar. Og tað er óneyðugt.

Men nú talvan er kritað, haldi eg, at Uni skal rista dustið av sær og sleppa øllum tvungnum lærum um rím og ørindi. Við orðunum hjá Heðini Brú kunnu vit lættligani siga, at Uni hevur fingið støðið og tað gott. Nú er tíðin komin at sláa gluggarnar frá.

## Eydnukravið lokið?

Tey sum arbeiða í verkætlanum hava serligar máliskur. Eydnukrav rópa tey minsta markið fyri at verkætlanin skal eydnast. Innan í húsanum sigur Uni Arge, at "ført tú okkurt burtur úr bara einum av sangunum, fløvar tað mítt hjarta."

Við bert einum sangi við fullum stigatalið eydnaðist verkætanin til fulnar í mínum føri. Men eg haldi, at Uni setir eydnukravið í so lágt. Hetta merkir úrslitið, ið verður ov spakført og ivandi.

Veit, at Uni hevur fleiri sangir í skuffuni. Henda fyrsta útgávan hjá Fa Uni Music, sum Expert ber út, hevur frámerkið UA01. "Útgáva null tvey kemur, fái eg ikki null trý í karakteri fyri hesa," sigur Uni.

## Smakkdómarin

Hvør hevur sín smakk og karakter havi eg ikki givið í útvið tíggju ár. Eingin skal geva karakter, tí hin fyrsti taparin er nummar tvey. Øll eiga teirra karakter.

Sum umbiðin smakkdómari fyri Sosialin, skulu míni subjektivu ráð verða, at Uni hvessir pennin og letur orðini bylgja nógv fríðari enn Mitt í sjónum. Tora at rógva seg í íður, krøkja í eitt hávahjarta og lata havsins penn føra okkum hagar journalistikkurin ikki røkkur. Tora at sleppa tí turrgelt staðfestandi journalistiska skrivingarlagnum og finn saft og kraft, sum hjá Hemingway, Springsteen, Lundell og kára p. Tað hevði klætt honum væl.

Higartil er útgerðarfelagið hjá Una ov pent, fitt og avmált. Men gamaní, topptrimmað til okkara útvarpsbylgjur, sum - øllum til vildar - eru mitt í havinum.

## 2. TÚSUNDTALS ÁR

Onki eg veit um tær løtur
sum eg biði eftir í kvøld
eg hómi valla tær gøtur
sum eg gangi komandi øld
eg kenni á mær ein iva
og felli eitt friðarligt tár
hvar skal eg fara og liva
í komandi túsundtals ár

Hvør verður hjá mær á degi
og hvør heldur um meg á nátt
hvar skal eg leita mær megi
at stíga um ókenda gátt
eg veit at byrja má ferðin
mær leingist tó eftir í gjár
nær kemur aftur tann verðin
eg kendi í túsundtals ár

Mær hjálpir ikki tann ótti
sum trokar seg fram av og á
eg kann ei reika sum flótti
ið mist hevur innastu trá
nú má eg velja og skilja
at val eru onkuntíð svár
tað sum eg skal má eg vilja
í komandi túsundtals ár

So lat bara tíðina koma
og alt tað sum hon ber við sær
lat bara verðina broytast
tað farna eg goymi í mær
varliga skal eg nú stíga
við sannføring í míni sál
og meðan árini líða
so veit eg – eg komi á mál